


*Føroysku flogbóltskvinnurnar hava havt nógvar gyltar løtur á Oyggjaleikunum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kvinnurnar eru favorittar

**Føroysku flogbóltskvinnurnar hava vunnið gull á Oyggjaleikunum seinastu tvær ferðirnar, og verða tí gjørdar til favorittar hesaferð. Menninir stíla eftir at betra um fjóðra plássi frá seinast**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyska flogbóltskvinnurnar ætla at gera eitt hattrick á Oyggjaleikunum hesaferð. Tær hava vunnið Oyggjaleikirnar tvær ferðir á rað, og nú stíla tær eftir triðja gullinum.

Kvinnurnar í flogbólti hava góð úrslit at vísa á, og tær syrgdu eisini fyri fyrsta gullinum hjá føroyingum á Oyggjaleikum. Tað var á Guernsey í 1987.

– Tað er trupult at meta um, hvussu sterkt okkara lið er hesaferð, tí vit vita ikki, hvussu nógv hinar oyggjarnar hava tikið seg fram. Okkara lið er tó minst líka gott hesaferð sum fyri tveimum árum síðani, og hava hinar oyggjarnar ikki tikið seg fram, so trúgva vit uppá, at vit kunnu koma í finaluna enn einaferð, sigur Niclas Joensen, sum er venjari hjá kvinnunum.

Flogbóltskvinnurnar hava vant nógv fram móti Oyggjaleikunum, og tær hava millum annað verið á venjingarlegu uttanlands. Har fingu vit góð úrslit ímóti donskum liðum.

Liðið er fyri tað mesta manna við heimligum spælarum, men tríggjar av kvinnunum spæla í Danmark. Tað eru Helen á Lakjuni Jacobsen, Joanna Joensen og Alvilda Ólavsdóttir.

## Menninir

Flogbóltsmenninir taptu fyri tveimum árum síðani dystin um bronsuna og endaðu tí sum nummar fýra. Málið hjá teimum er at fáa minst líka gott úrslit hesaferð, og tað er okkurt, sum talar fyri, at hetta kann eydnast.

Liðið er væl fyri, og hópurin tykist verða breiðari enn áður.

Seinasta vikuskiftið vóru teir í Danmark, og tá vunnu teir sannførandi 3-1 á grønlendska landsliðnum, sum eisini er við á Oyggjaleikunum.

Danin Jesper Brix er venjari hjá monnunum, og hann hevur áður staðið á odda fyri mansliðnum til Oyggjaleikir.

Mansliðið hevur tveir útisetar á liðnum. Tað eru Bárður B. Mikkelsen, sum spælir í bestu donsku deildini, og Jóhann Nielsen, sum spælir við ÍF Føroyum. Seinastu tíðina hevur Ragnar Petersen eisini vant í Danmark.




*Menninir endaðu seinast sum nummar fýra, men okkurt bendir á, at teir kunnu fáa betri úrslit hesaferð.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Flogbóltur

**Kvinnur:**
Alvilda Ólavsdóttir
Ingun Midjord
Gudrid Nolsøe
Margit G. Joensen
Sólgerð Henriksen
Helen á Lakjuni Jacobsen
Juanna S. Joensen
Marjun Kalsø
Anna Müller Jacobsen
Tina Jacobsen
Karin Mikkelsen
Herborg á Mýrini

**Menn:**
Johann Nielsen
Odd Eliasen
Rúni Weihe
Andrass Jógvansson
Jan Áki Olsen
Bárður B. Mikkelsen
Jens Heri N. Mortensen
Johan Petur á Stongunum
Heini Weihe
Bartal Eliasen
Suni Juul Pedersen
Ragnar Petersen



# Níggjunda ferðin til oyggjaleikirnar

**Marjun Kalsø má sigast at vera ein av landsins bestu kvinnuligu flogbóltsspælarum. Tríggjar ferðir er hon kosin ársins hevari, og hon hevur átt sín stóra lut í øllum meistaraheitunum hjá kvinnudeildini hjá Mjølni - umframt trý oyggjaleikagullmerki. Hóskvøldið fór hon fyri 9. ferð til oyggjaleikirnar**



*Fyri 9. ferð fer Marjun Kalsø við á oyggjaleikirnar sum ein av lyklaleikarunum á føroyska flogbóltslandsliðinum*

*Mynd: Jens K. Vang*

OYGGJALEIKAPRÁT
*Solby A. Eliasen*

Marjun Kalsø hevur verið við á oyggjaleikunum, síðani í 1987. Tá vóru teir eisini á Guernsey. Tá eydnaðist tað føroyska liðinum at vinna gull. Síðani hava tað gingið nøkur ár, har føroyska liðinum ikki eydnaðist at enda ovast á sigurskamlinum. Men í 1999 vunnu tær so aftur og endurvunnu tað á seinastu leikunum í 2001 á Isle of Man.

Marjun hevur sum sagt verið við síðani í 1987, og enn eru bæði hugurin og orkan líka góð sum í fyrstuni. Ofta hevur Marjun sagt, at nú er liðugt. At hon fer at gevast, men tá so venjingin byrjar aftur, so er hon altíð at síggja millum leikararnar hjá Mjølni.

- Eg orki líka væl enn, men tað tekur kanska heldur longri tíð at hvílast aftur nú, enn tá eg var yngri, sigur Marjun og smílist.

Spurd um, hvussu tað ber til, at tað føroyska flogbóltslandsliðið er so væl fyri og hevur verið tað so í so nógv ár, svarar Marjun, at flogbólturin í Føroyum er á sera høgum støði samanborið við hini londini, sum luttaka á oyggjaleikunum.

- Vit venja bæði nógv og hart, sigur hon og tekur venjingarætlanina hjá landsliðinum fram. Har sást at tær hava vant hvørt vikuskiftið síðani síðst í mars mánaði. Vant hevur verið tvær ferðir um dagin hvørt vikuskiftið, og so mikukvøld eisini. Landskappingin endar vanliga í mars, men tær sum eru við á landsliðinum hava so framhaldandi vant líka til nú.

Vónirnar hjá Marjuni eru góðar til hesar leikirnar.

- Vit eru væl fyri, og vit fara avstað fyri at verja gullið, tað er púra vist, men nú fáa vit at síggja. Tað kann vera heldur torført at siga nakað, tí ein veit ikki, hvussu stór framstig hini liðini hava gjørt seinastu tvey árini, sigur hon. Harðastu kappingarneytarnir hjá Føroyum til seinastu leikirnar vóru Sarema og Áland.

- Nú er eitt nýtt lið við eisini, sum vit onki kenna til. Bermuda, so tað verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer at ganga, sigur Marjun.

Marjun greiðir frá, at tá leikirnir vóru á Guernsey í 1987, tá spældu tær á flisagólvi.

- Tá tordu vit nokk so illa at kasta okkum, men sum eg havi skilt tað, so er gólvið har nú meira sum vit kenna tað. Og tað vóni eg, sigur hon og leggur afturat at tað annars altíð hava verið góðar umstøður at leika í á oyggjaleikunum.

## Nýggjar avbjóðingar

Hon ásannar, at nú føroyska liðið hevur vunnið oyggjaleikagull tríggjar ferðir, at oyggjaleikirnir ikki longur kunnu sigast at vera ein so stór avbjóðing.

- Flogbóltssambandið eigur at leita eftir øðrum møguleikum til landsliðið eisini, sigur hon, men leggur afturat, at tær luttaka í Evropa Cup í c-bólkinum, har fleiri aðrar smátjóðir eisini eru við.

Marjun Kalsø er aldursforseti á føroyska liðinum, men tað letur ikki til at gera tað stóra fyri hana - hvørki leikliga ella á nakran annan hátt. Hon gongur við lív og sál inn fyri síni ítrótt, og henni dámar sera væl at vera við. Hon greiðir frá, at oyggjaleikirnir eru nakað heilt serligt, tí vinarbond verða knýtt.

- Tað er ikki so, at sambandið verður hildið við líka gjøgnum tey bæði árini, sum eru ímillum leikirnar, men vit kennast altíð aftur. Fleiri, sum eru givin at spæla, koma við aftur sum áskoðarar, greiðir hon frá. Og Marjun verður uttan iva við sum áskoðari, tá hon einaferð hevur lagt flogbóltin á hillina.

- Eg veit ikki, nær eg fari at gevast. Tankin hevur verið í høvdinum á mær, at hetta møguliga verður seinastu ferð, at eg verði við til oyggjaleikirnar, men nú fáa vit at síggja, sigur royndi flogbóltsleikarin at enda.




# Langur vegur til heiðursmerki

**Føroysku tennisspælararnir hava fyrireikað seg væl til Oyggjaleikirnar, men teir rokna ikki við, at teir fara at vinna heiðursmerki**

TENNIS
*Eyðun Klakstein*

Fyri tveimum árum síðani meldaði tennisitróttin pass, tá ið tað snúði seg um Oyggjaleikirnar. Hetta hevði við sær, at virksemið innan hesa ítrótt minkaði nógv.

Nú hava føroysku tennisspælararnir mannað seg upp aftur, og fimm spælarar fara til Guernsey at royna kreftir.

– Tað er ikki realistiskt at rokna við, at vit fara at vinna heiðursmerki. Tað eru nógvir sera sterkir spælarar við á Oyggjaleikunum. Summir eru hálvprofessionellir, og onkur er væl uppi á svenska styrkislistanum, sigur Jón Brekku, sum er ein av tennismonnunum.

– Av tí at vit ikki vóru við á Oyggjaleikunum seinast, var tað næstan steindeytt innan tennis í langa tíð. Nú er meira lív komið í aftur. Vit hava roynt at bøtt um umstøðurnar við vøllin, og so hava vit vant so nógv, sum vit kunnu.

## Møta heimaliðnum

Fimm spælarar hava fyrireikað seg til Oyggjaleikirnar, og teir fara allir avstað. Ætlanin var at senda fýra spælarar og ein venjara avstað, men ístaðin valdu teir at senda fimm spælarar, so teir høvu onkran til at taka, skuldu skaðar komið uppí.

Og júst hetta hevur víst seg at gerast veruleiki. Jóhann Krog stríðist við skaða, og hann fer tí bara at royna seg í einmansleiki. Annars verður hann liðleiðari.

Allir teir fimm verða við í kappingini í einmansleiki, og tvey lið luttaka í tvímansleikinum.

Harafturat manna føroyingar eisini lið til liðkappingina. Har skulu teir í fyrsta umfarinum møta heimaliðnum Guernsey, sum sigst hava eitt sterkt lið. Skuldu føroyska liðið klára at bast Guernsey bíðar Rhodos eftir teimum í næsta umfarinum. Rhodos vann kappingina seinast.

Allar kappingarnar eru skipaðar eftir cup-skipan. Tað vil siga, at tá ið ein spælari ella lið tapir ein dyst, verður tað sent úr kappingini.

Spælt verður á graslíkisvøllum á Guernsey.

### Tennis

Jón Brekku
Martin Simonsen
Kristin Jensen
Teitur Poulsen
Jóhann Krog